**Starv á Fróðskaparsetri Føroya**

## Lektari í samfelagsfrøði

Á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum er eitt granskingar- og undirvísingarstarv í samfelagsfrøði leyst at søkja. Starvið verður sett sum lektarastarv, og tann ið settur verður, skal virka fyri at menna gransking, útbúgving og undirvísing í samfelagsfrøði á deildini.

**Starvsøki:**
Granskingarparturin verður tengdur at serøki umsøkjarans. Samstarv innan- og uttanseturs er týdningarmikið í starvinum.

Undirvísingarparturin fevnir um at hava ábyrgd av útbúgvingini í samfelagsfrøði og at undirvísa. Tann, ið settur verður, skal eisini vera við til at endurskoða núverandi B.S.Sc.- útbúgving í stjórnmálafrøði, áðrenn studentar verða tiknir upp til nýtt nám at byrja á heysti 2009.

**Førleikakrøv:**
Umsøkjarar skulu umframt kandidatútbúgving sum stjórnmálafrøðingur ella líknandi frøðigrein hava granskaraútbúgving á Ph.d. stigi og undirvísingarroyndir.

Við umsóknum skulu fylgja avrit av vísindaligum avrikum í trimum eintøkum, eins og umsøkjarar skulu lýsa undirvísingarroyndir sínar.

Sett verður metingarnevnd at meta um førleikarnar hjá umsøkjarunum. Gjørt verður vart við, at hvør umsøkjari fær sendandi metingina um sínar førleikar.

Starvið verður at seta 1. oktober 2008.
Umsóknarfreistin er **11. august 2008.**

Løn og starvstreytir eru sambært sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda tær til deildarleiðaran Elin Súsonnu Jacobsen, telefon 352583/226495, elinsj@setur.fo ella til Beintu í Jákupsstovu, telefon 352582, beinta@setur.fo. Upplýsingar um virksemi á Fróðskaparsetrinum eru at finna á heimasíðuni: www.setur.fo

**Umsóknir skulu sendast til:**

***FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA***
Setursskrivstovan, tlf. 35 25 00
J. C. Svabos gøta 14
Postrúm 272
110 Tórshavn
www.setur.fo

# Maskinstjóri

**til veitingarskip í frálandavinnu**

**Søkt verður eftir maskinstjóra til veitingarskip í frálandavinnu í Norðsjónum at mynstra sum skjótast. Skipið er skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni, FAS, og verður mannað við føroyingum burturav.**

**Maskinorkan er 8000 HK.**

**Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at ringa 35 85 31 ella 21 85 33.**

**Umsóknir kunnu sendast til Sp/f Team Beredskab, Niels Finsensgøta 23, FO-100 Tórshavn ella á t-post: joan@tor-shipping.fo.**

**Sp/f Team Beredskab**



# LAMA gongutúrar

Gingið verður av oyggjarvegnum til Leynar.

Leiðin liggur framvið Skælingsvatni, har Nykurin helt til.

Vit njóta friðin í vøkru náttúruni ímillum Sátuna og Skælingsfjall.

Fyri sunnan liggur Koltur, fyri vestan Vágaland. Eitt satt fragd fyri eyga!

Um tilber vitja vit træskera.

Aftaná eina lætta máltíð á úticafé í Leynum, verður koyrt aftur til Tórshavn.

Túrurin er sera lætt gongdur.

Farið verður úr Tórshavn leygar- og sunnudagar kl. 14:00.
Sjálvandi eru tær báðar Lama og Alpacha við á túrinum.

Tilmelding á **tlf. 28 54 55** í seinasta lagi dagin fyri.

Aðrar tíðir kunnu avtalast.

í Sosialurin



## Tannklinikkatstøðari
(Klinikkassistentur)

Tannlæknastovan á A. C. Evensensgøtu sóknast eftir útbúnum tannklinikkatstøðara at byrja 20.08.2008.

Talan er um eitt tíðaravmarka fulltíðarstarv fyri fólk í barnsburðarfarloyvi, við møguleika at halda fram.

**Førleikakrøv:**
- útbúgving sum tannklinikkatstøðari
- kunna arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni
- ágrýtni

Løn verður ásett eftir nærri avtalu.

Umsóknarfreistin er 08.08.2008.

Umsókn, við viðkomandi skjølum, skal sendast til:

**Tannlæknastovan**
A. C. Evensensgøtu 14
Boks 235
FO-110 Tórshavn

BERIT OLSEN TANNLÆKNI, SÓLVÁ EYSTBERG TANNLÆKNI OG KRISTIAN DJURHUUS TANNLÆKNI.

# KAPPRÍÐING Á ÓLAVSØKU

Kappríðing verður í Marknagili týsdagin 29. juli kl. 15. Tilmelding seinast mikudagin 23. juli kl. 19.

**Ring: 219098 · 211789 · 211868 · 263239**



**FØROYA RÍÐINGARFELAG**

## HÚS TIL SØLU Í LEIRVÍK

Hús við trimun hæddum, sum eru bygd í 1961 verða seld um nóg høgt boð fæst.

**Ring á tlf 265450 ella á 221007.**

# Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við